## Dráttur hevur bussar við

Nógv verður lagt fyri, nú flogbóltsfinalan stendur fyri framman. Tey fýra feløgini í finaluni hoyra øll heima uttan fyri høvuðsstaðin, og tí verður frá onkrum teirra eisini skipað fyri bussferð. Tað gera tey eisini hjá Drátti, har felagið hevur boðið áskoðarunum ókeypis bussferð. Felagið heitir á áskoðarar um at møta kl. 12.15 við Høllina á Giljanesi. Koyrt verður klokkan 12.30.

## Fyrsta FIFA-uppgávan til Petur



Petur Reinert, sum nú er altjóða dómari, skal tann 24. mars undir fyrstu altjóða uppgávuna. Talan er um elitukapping fyri U-17 lið, sum verður hildin í Italia. Liðini, sum taka lut í hesi, eru Kekkia, Italia, Slovakia og Ukraina.

Umframt Petur Reinert, skal Jón Kári í Brekkuni eisini við á ferðini sum hjálpardómari.

# Fyrsta ferðin í steypafinaluni



*Bæði liðini tykjast samd um, at høgu spælararnir kollfjarðamegin netið kunnu gerast avgerandi fyri finaluna*

**- Vit eru størri enn tær, og hetta skulu vit gera okkum dælt av, sigur Angilie Johannesen hjá KÍF. Hon væntar, at blokkurin hjá kollfirðingum fer at hava nógv at siga í steypafinaluni ímóti Drátti**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

KÍF hevur ongantíð áður roynt at vunnið nakað í bestu kvinnudeildini í flogbólti. Tær hava eitt rættiliga nýtt felag í hesum høpi, men nógvu tey seinastu árini hava yngru liðini víst, at okkurt spennandi hevur verið á veg í Kollafirði.

Úslitini hjá besta liðnum eru eisini blivini betri og betri, sum árini eru liðin, og árið í ár hevur higartil verið tað besta í søguni. Kappingin var ikki meir enn farin í gongd, so hevði KÍF tryggja sær luttøku í síni fyrstu steypafinalu nakrantíð. Tær vunnu nevniliga FK-kappingini, sum var heilt afturi í oktober mánaða, men eftir hetta steðgaði upp hjá KÍF.

Í landskappingini gekk aftur á bakka, og ikki fyrrenn tær komu til endaspælið byrjaði aftur at bragda. Seinastu fimm dystirnir hava ført fýra sigrar við sær, og nú vóna kollfirðingar, at kvinnurnar skulu halda fram við góða spælinum, tá tær møta Drátti í steypafinaluni.

### Kempa væl

KÍF hevur alt fólki tókt til dystin ímóti Drátti leygardagin, og Angilie Johannesen væntar heilt víst ein javnan dyst.

- Dráttur er helt favorittur undan dystinum. Tær liggja betur fyri í landskappingini og hava roynt hetta fyrr, so tað er heilt víst ein fordeilur hjá teimum. Vit ætla tó at kempa til tað síðsta, tí hesin dysturin skal vinnast.

Angilie sigur eisini, at leikararnir hjá Drátt ikempa væl, og at KÍF skal royna at steðga miðjuni.

- Dráttur hevur eitt gott lið, og serliga miðjan roynist sera væl. Tær kempa eisini ótrúliga væl á gólvinum, og tí verður týdningarmikið hjá okkum at avgera bóltarnar beinanvegin.

- Tær hava eisini fleiri góðar ungar leikarar. M.a. hevur Ruth Thomsen spælt væl í fleiri dystum. Hon er tó ikki so stór, so vónandi fær blokkurin fatur á henni leygardagin.

### Blokkurin verður avgerandi

Angilie heldur eisini, at blokkurin fer at hava sera stóran týdning fyri KÍF í steypafinaluni.

- Blokkurin hjá okkum hevur verið sera góður síðstu dystirnar, og hesin kemur heilt víst at vera avgerandi í dystinum ímóti Drátti. Vit eru væl størri enn tær, so hetta skulu vit gera okkum dælt av. Eg meti tað eisini vera týdningarmikið, at vit megna at steðga teirra álopum yvir miðjuna, tí klára vit tað, so stendir væ ltil.

At enda spurdu vit Angilie, um royndirnar komu at hava nakran týdning í hesum dystinum.

- Tað er sjálvandi ilt at meta um. Tær hava roynt hetta fyrr, so hetta er kanska ein lítil fyrimunur hjá teimum, men eg vænti ikki, at hetta fer at merkjast so væl. Har verður nógvur larmur í høllini, so vit mugu bara fara út á vøllin og tosa saman og stóla uppá hvørja aðra, so skal alt nokk ganga, segði Angilie at enda.

# Skulu fram við blokkinum

**- Blokkurin er teirra sterkasta síða. Sleppa vit fram við honum, so er nógv vunnið. Hetta sigur Torgunn Jónsdóttir hjá Drátti. Hon heldur tó, at liðið hjá Drátti er meir fjølbroytt, og hetta ger, at tær kunnu leypa á frá øllum síðum**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Dráttur hevur klárað tað væl í kvinnuflogbólti síðstu árini. Bæði í landskappingini og í steypakappingini hava úrslitini verið góð, og sjálvt um alt ikki hevur gingið eftir vild alla tíðina í hesum kappingarárinum, so hava úrslitini tó verið á góðari leið.

Í landskappingini lógu tær leingi á odda í grundspælinum og eitt skifti í endaspælinum, men síðstu dystirnar hevur ikki gingið so væl. Tær liggja nú á triðja plássi, og vónirnar at vinna meistaraheitið eru ikki tær stóru longur.

Í steypakappingini hava tær tó megna at leikt seg fram í sjálva finaluna. Í januar mánaða vunnu tær nevniliga Mjølnir-kappingina, og tá var greitt, at tær skuldu møta KÍF í steypafinaluni.

### Tær hava ein fyrimun

Torgunn Jónsdóttir hjá Drátti væntar ein spennandi dyst, men hon heldur, at KÍF kanska hevur ein lítlan fyrimun undan dystinum.

- Gongdin hjá KÍF hevur verið sera góð síðstu dystirnar. Tær hava spælt væl, og hetta hevur rættiliga givið úrslit hjá teimum. Hjá okkum hevur hinvegin ikki gingið so væl, so kanska hava tær ein lítlan fyrimun. Eingin skal tó ivast í, at vit ætla okkum at vinna dystin leygardagin.

Hon sigur eisini, at leikararnir hjá Drátti hava lagt sær í geyma, at blokkurin hjá KÍF er sera sterkur.

- Teirra sterkasta síða er uttan iva blokkurin. Seinast vit spældu ímóti teimum gav hesin okkum stórar trupulleikar. Sleppa vit fram við blokkurin, so er nógv vunnið, so hetta verður umráðandi.

- KÍF hevur eisini fleiri góðar leikarar á liðnum, sum vit skulu ansa eftir. Bæði Hjørdis Johannesen og Guðrið Syderbø eru góðir leikarar, sum kunnu nógv, so teimum skulu vit halda eitt vaki eyga við, sigur Torgunn.

### Fjølbroytt lið

Torgunn metir tó, at liðið hjá Drátti er minst líka gott sum liðið hjá KÍF.

- Vit hava eitt fjølbroytt lið, og tí kunnu vit eisini leypa á frá øllum síðum. Hetta er sjálvsagt ein av okkara stóru styrkjum. Um vit faá okkara spæl at koyra, so ivist eg ikki í, at vit fara at vinna steypafinaluna.

- Tað verður tó eisini týdningarmikið, at okkara kantar klára at sláa ígjøgnum blokkin hjá KÍF. Raka tær dagin, so stendir væl til.

Seinast hesi bæði liðini møttust vann KÍF rættiliga sannførandi, og Torgunn sigur eisini at enda vóna, at hesin dysturin verður heilt øðrvísi.

- Vit hava hugt eftir tí dystinum á bandi, og tá spældu vit ikki alt ov væl. Vit mugu sjálvandi rætta uppá feilirnar frá tí dystinum, men eg vænti, at dysturin leygardagin verður heilt øðrvísi.